# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Spæla við lagnuna hjá Suðuroynni

Í blaðnum í dag sigur landsstýrismaðurin í samferðslumálum, at hann vil helst hava trupulleikan við black'outunum hjá Smyrli loystan, men at hann ikki veit, um játtan fæst til hetta.

Álvaratos, hava vit hug at siga. Smyril er farvegurin hjá 5.000 føroyingum til restina av Føroyum – og øvut. Tað ber ikki til, at vit í dagsins samfelag siga, at kanska fáa vit hetta gjørt og kanska ikki, tá um ræður tilverugrundarlagnum hjá einum tíggjundaparti av Føroya fólki. Og í ringasta føri kann talan verða um ein spurning, sum snýr seg um lív ella deyða hjá teimum, sum eru umborð.

Trupulleikarnir við black'out hjá Smyrli eru iki nýggir, men lukkutíð hava veður og vindur spælt við, hvørja ferð hetta er hent. Men vit búgva altso mitt í Atlantshavi, og tá ber ikki til at vóna, at veður og vindur altíð spæla við.

At fara undir nýggja vetrarsigling uttan at tryggja seg best møguligt ímóti endurtøkum av hesum slag, er snøgt sagt at spæla hasard við 5.000 føroyingum, og tað kunnu hvørki strandferðuslustjórin, landsstýrismaðurin ella Føroya løgting standa modell til.

Alternativið er snøgt sagt, at Smyril ongan tíð skal loysa frá landi, uttan so, at tað er full vissa fyri, at vindmegi og –ætt eru av teimum bestu.

**Sosialurin**

## Tíðindaskriv frá Meginfelag Sjúkrakassa Føroya

**Nú hevur spurningurin um ognarrættin til føroysku sjúkrakassarnar fingið nógva umrøðu í fjølmiðlunum og landsstýrismaðurin var í útvarpinum sunnudagin, tann 15.11.09, har hann førdi fram ymisk viðurskifti, sum vit ikki halda skulu standa ósvaraði**

**Lógin um føroyskar sjúkrakassar**

Tað, sum landsstýrismaðurin roynir at snúgva sær undan er, at endurgeva tað sum stendur í **§ 2** í lógini, nevniliga at **ein sjúkrakassi er eitt felag**.

Vit hava ongantíð fingið frágreiðing frá landsstýrismanninum, um við hvørjari løgfrøðiligari grundgeving hann heldur, at landsstýrið kann leggjast á ognirnar hjá einum felag og vit halda tað hevði verið forvitnisligt, um fjølmiðlafólk høvdu kannað hesi viðurskifti nærri, og fingið eina frágreiðing frá landsstýrismanninum, um júst hendan spurningin, sum løgfrøðiliga er rættiliga avgerandi, tá støða skal takast til spurningin um ognarrættin til føroysku sjúkrakassarnar.

Løgfrøðiligu kanningarnar, sum gjørdar eru í málinum.

Tað er undrunarvert, at landsstýrismaðurin setir spurningartekin við løgfrøðiligu metingina, sum Sigmund Poulsen, adv. gjørdi í útvarpinum fríggjakvøldið og vit halda ikki tað er seriøst, at landsstýrismaðurin vísti á, at Sigmund Poulsen arbeiðir á somu advokatskrivstovu sum umboðar Meginfelag Sjúkrakassi Føroya í málinum, uttan at landsstýrismaðurin greiddi frá, hvør advokatskrivstovan er, sum vegna Heilsumálaráðið hevur gjørt eina løgfrøðiliga kanning av málinum.

Tað er júst ein av fyrrverandi starvsfeløgunum hjá landsstýrismanninum, sum hevur gjørt hesa løgfrøðiligu kanning, men vit halda, at sjónarmiðini hjá hesum advokati væl og virðiliga eru afturvíst í sambandi við tær løgfrøðiligu kanningarnar, sum meginfelagið hevur latið gjørt.

Landsstýrismaðurin roynir við illgitingum at leggja fótonglar fyri ætlaðu skipanina við framhaldssjúkrakassa í Føroyum.

Vit halda tað er rættiliga átaluvert, at landsstýrismaðurin, sum umboðar almennan myndugleika í hesum málinum, fer út alment og sigur, at tað bert vera tey vælbjargaðu, sum koma at vera limir í einum framhaldssjúkrakassa, sum ætlanin er at skipa.

Vit hava kannað, hvussu støðan er í grannalondum okkara og vit hava staðfest, at í Sygesikringen Danmark umboðar limaskarin allar samfelagsbólkar í Danmark og vit ivast ikki í, at soleiðis verður skipanin eisini í Føroyum, serliga tá vit kunnu staðfesta, at tá sparingar fara fram á fíggjarlógini her heima, so er tað ikki ókent, at sparingar eisini verða framdar t.d. á almanna- og heilsuøkinum.

Vit ivast tí ikki í, at tað er rættiliga sannlíkt, at almennar sparingar framyvir eisini fara at raka almennu heilsutrygdina, og tí verður uttan iva tørvur á einari skipan við privatari sjúkratrygd, soleiðis sum verandi sjúkrakassar nú arbeiða við.

Vit hava ilt við at skilja, at landsstýrismaðurin soleiðis fer alment út og setur fram illgitingar uttan at hann yvirhøvur tykist at hava kannað hendan spurning um, hvussu limaskarðin er í teimum framhaldssjúkrakassum, sum skipaðir eru í grannalondum okkara.

Landsstýrismaðurin hevur als einki grundarlag fyri sínum illgitingum.

Viðmerkingar til tað, sum landsstýrismaðurin er endurgivin fyri at siga í Sosialinum 11.11.09.

Tá landsstýrismaðurin sigur, at hann fer at strekkja seg langt fyri at fáa eina semju í lag við føroysku sjúkrakassarnar, so skilja vit ikki hví landsstýrismaðurin so av øllum alvi roynir at fáa sannført føroya fólk um, at tað er landskassin sum eigur sjúkrakassarnar, tí um hetta var støðan, so var jú einki at samráðast um.

Tá landsstýrismaðurin í blaðnum sigur, at tað eru limirnir í sjúkrakassanum sum eiga pengarnar, sum hoyra til føroysku sjúkrakassarnar, so er her andsøgn millum hesi úttalilsir og úttalilsini um, at tað er tað almenna, sum skal yvirtaka ognirnar hjá sjúkrakassunum.

Vit kunnu viðmerkja, at tað beinleiðis stendur í lógini, at ognirnar hjá sjúkrakassunum ongantíð kunnu býtast út millum limir felagsins, og tí er tað ikki rætt, at limirnir hava nakran ognarrætt til tað, sum sjúkrakassarnir eiga.

Tá landsstýrismaðurin í blaðnum vísir á, at allir limirnir í sjúkrakassanum verða fluttir yvir í tað almennu heilsutrygdina, og at peningurin tískil eigur at fylgja við, so er hetta beinleiðis misskilt, tí eingin persónur verður fluttur úr nøkrum sjúkrakassa yvir í almennu heilsutrygdina, tí allir limir í sjúkrakassanum hava fullan rætt til at varðveita sín limaskap í sjúkrakassanum, tá hesir eftir ætlan skulu halda áfram á privatrættarligum grundarlagi, sum er tað grundarlag sjúkrakassarnir alla tíð hava vika á.

Tá landsstýrismaðurin eisini rør framundir, at tað skal vera sera kostnaðarmikið at vera limur í einum framhaldssjúkrakassa, so er hetta eisini ein roynd at illtonkja eina privata sjúkratrygging, tí limagjaldið í t.d. Sygeforsikring Danmark er kr. 33,00 pr. mðr. fyri hvílandi limaskap, meðan bólkur 1, sum hevur rímiliga góðan dekning rindar kr. 234,67 pr. mðr. Tí er tað ein grundarleys illtongjan, tá landsstýrismaðurin uttan nakað sum helst grundarlag rør uppundir, at ein privatrættarlig skipan skal verða kostnaðarmikil, serliga tá landsstýrismaðurin sjálvur ætlar at áleggja hvørjum føroyingi at gjalda kr. 245,00 pr. mðr. til almennu sjúkratrygdina, so einki er, sum bendir á, at landsstýrismaðurin hevur rætt í metingum sínum um, at ein privatrættarlig skipan fer at verða ov kostnaðarmikil.

**Meginfelag Sjúkrakassa Føroya**

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.